## Kanna havbotnin



Síðani tann 1. oktober hevur norska havrannsóknarskipið G. O. Sars kannað havbotnin fram við Troms-strondini og úti fyri Andøya. Kanningarnar eru liður í einari stórari verkætlan, og eftir henni skulu serfrøðingar kanna umleið tvær mió. ferkilometrar av havbotninum fram við norsku strondini. Granskararnir hava longu funnið nógv sjáldsamt og óvæntað. Millum annað komu teir fram á hesa havmúsina uttan fyri Troms-strondina.

## Týsk sjónvarpsstøð fer á fjall við bónda í Lamba

Landsdekkandi sjónvarpsstøðin í Týsklandi; ARD kemur til Føroya 18. oktober. Týsku sjónvarpsmennirnir steðga í Føroyum í 6 dagar. Ætlan teirra er at filma, tá Tórfríður Magnussen og fjallmenn hansara fara á fjall á Eystursíðuni, og á Mjóvanesi í Eysturoynni. Upptøkurnar skulu brúkast í sendingini "Weltspiegel" fyrst í November mánað. Weltspiegel er millum týdningarmestu sendingarnar hjá ARD. Tað lá ikki fyri hjá týska sjónvarpsliðnum at koma til Føroya fyrr á árinum. Tí hevur Tórfríður Magnussen latið nøkur gimburlomb ganga eftir. Tórfríður og fjallmenn hansara fara so eftir hesum gimburlombunum, so týsku sjónvarpsmennirnir fáa filma hetta. Kjøtið frá Eystursíðuni og Mjóvanesi er tiltikið gott, og gongur altíð skjótt og væl at selja hetta kjøtið!

# Tað gongur púra ogan veg

**Vit bara bíða. Tað hevur gingið ógvuliga striltið síðani vit fóru undir verkætlanina, og í løtuni bíða vit eftir, at VMR fær eina eykajáttan, so samráðingarnar veruliga kunnu fara í gongd, sigur Ingi Højgaard**



*Ingi Højgaard ótolnast eftir, at nakað skal henda í málinum um Skálafjarðartunnilin. Men fær VMR eykajáttan, so sum teir hava søkt um, kann nógv gerast eftir einum mánaði*

*Mynd: Jens Kristan Vang*

**SKÁLAFJARÐAR-TUNNIL**

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Nú fara skjótt at verða tvey ár síðani, at nevndin fyri Skálafjarðartunnilin lat Vinumálaráðnum umsókn um loyvi at byggja tunnil millum Skálafjørðin og Sund. Men enn hevur bert smávegis fundarvirksemi verið partanna millum.

- Í løtuni gongur ongan veg. Vinnumálaráðið sigur seg ikki kunna samráðast, tí teir hava ikki neyðugu ekspertisuna, og hana mugu teir keypa sær uttanífrá. Og fyri at kunna gera tað, mugu teir fáa eina eykajáttan frá Fíggjarnevndini, og henni bíða teir eftir. Tað er í hvussu er tað, sum sagt verður, sigur Ingi Højgaard, sum er ein av nevndarlimunum í felagnum fyri Skálafjarðartunnilin.

Hann heldur ikki, at Vinnumálaráðið hevur brúkt serliga nógvar resursir upp á málið, men leggur aftrat, at undarførslan hjá VMR er, at teir verða skornir á hvørjum ári, og at orkan tí bara minkar.

Útmeldingin frá Vinnumálaráðnum er, at teir væntandi fáa umbidnu eykajáttanina um mánaðarskiftið oktober/november, so vit mugu bara vónað, at so verður. Vit vita jú, at val skal verða í seinasta lagi 19. januar, og fáa teir eykajáttanina merkir tað, at vit í besta føri hava ein mánað at samráðast í, áðrenn val verður útskrivað. Og tá tað er hent, gerst einki, sambært Vinnumálaráðnum, sigur Ingi Højgaard.

### Viljin er alt

Nevndin fyri Skálafjarðartunlinum stendur tí í einari bíðistøðu, og tað er ikki nøkur ynskistøða.

- Tað er greitt, at ætlanin verður forskotin fyri hvønn dag, sum gongur. Og tað kann bara dýrka verkætlanina. Vit lótu jú umsóknina inn í januar mánaði í fjør, so tað er ikki akkurát sum, at Bjarni Durholm ikki hevur havt stundir at fyrireika seg í, sigur Ingi Højgaard.

Hann sigur, at var tað pengar, sum Vinnumálaráðið bíðaði eftir, so hava teir bjóðað sær at goldið ta hálvu milliónina, sum uttanlands serfrøðingurin kostar. Men tað góðtekur VMR ikki, og tað skilir Ingi Højgaard væl.

Hinvegin heldur hann, at verður eykajáttanin latin, skuldi nógv kunna latið seg gjørt upp á ein mánað.

- Er viljin til staðar, ber so nógv til. Og tá vit hava samráðst intenst í ein mánað ber avgjørt til at meta um, hvørt tað gerst fuglur ella fiskur, sigur Ingi Højgaard.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa orðið á Bjarna Djurholm, áðrenn blaðið fór til prentingar.

# Kloakknetið nútíðargerast

**Í sambandi við kravið frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni um, at allar kommunur skulu hava fullfíggjað og góðkent kloakknet innan ár 2010, verður nú farið undir fyrsta stig at nútíðargera kloakknetið í Nólsoy**

**KLOAKERING**

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Farið verður nú undir fyrsta stig at gera kloakknetið í Nólsoy tíðarhóskandi. Hetta er ein ætlan, sum fevnir um fíggjarárini 2007 og 2008.

Av tí at verandi leiðingar í bygdini ikki finnast í talgildum formi, men bert í skitsum, eru upplýsingarnar um leiðingarnar ivasamar.

Tórshavnar Kommuna sigur, at teir hava gjørt eina avtalu við IRF um at tøma rottangarnar í kommununi, og harvið eisini í Nólsoy. Í hesum sáttmálanum skal upplýsast, hvørjir tangar talan er um, og hvussu hesir eru plaseraðir í mun til veganetið.

Í hesum sambandi hevur Tórshavnar Kommuna heitt á eina fyritøku um at máta allar rottangar í kommununi, og leggja teir inn á eitt talgilt kort.

Við at leggja uppmáldu rottangarnar í Nólsoy saman við skitsuni av leiðingunum, fæst eitt betri yvirlit av leiðingunum í bygdini, vísir kommunan á.

Ætlanirnar fyri 2007 eru annars at leggja allar leiðingar, sum í dag verða leidd ar í havnalagið, í eitt pumpuhús, sum síðani skal pumpa kloakkirnar norður um Kirkjutanga og út á streymasjógv.

Í 2008 skal so restin av bygdini kloakerast av nýggjum, og millum annað skulu reinsibrunnar setast á leiðingarnar fyri hvørjar 40 metrar.

### Tríkvart millión

Fyri góðum ári síðani var so farið undir at gera verkætlan, og ein ráðgevi, Pb Consult, fór í gongd við at gera endaligt projekt.

Grøvir skulu gravast til kloakkirnar, og Føroya Tele boðaði frá, at teir vóru áhugaðir at verða við í grevstrinum, tí teir ætla at leggja nýggjan fipurkaðal til alla bygdina.

Talan er eisini um eina fjarhitaskipan, sum skal gerast har úti, og tí er ætlanin, at hava hetta í huga. Tað merkir so samstundis, at arbeiðið væntandi fer at taka longri tíð. Tó skal fjarhitin ætlandi ikki leggjast í somu grøv, men hinvegin er ætlanin at gera arbeiðið á ein slíkan hátt, at tað slepst undan alt ovn ógvum eykaarbeiði, tá fjarhitaleiðningurin skal leggjast seinni.

Mælt var til, at arbeiðið varð boðið út í einum, tó so, at arbeiðstøkan verður deild upp í tvey stig, ovari og niðari partur av bygdini.

Tekniska nevnd hevur síðani mælt til, at játta 750.000 krónur at fíggja kloakkeringina.

Og hóskvøldið samtykti býráðið so at játta hendan pening, so arbeiðið kann bjóðast út.